gult cyan magenta svart



ÚT AT KOYRA

## Longdur Mercedes A



Á bilaframsýningini í Geneve verður Mercedes A-klassin sýndur fram við nøkrum broytingum. Umframt smærri broytingar uttan og inn an, er bilurin eisini longdur við 12 cm, eins og báðir CDI turbodieselmotorarnir fáa meira hestakreftir.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Nissan Primera



Hóast nýggi Nissan Primera er frumsýndur í Japan, verður hann ikki at síggja um okkara leiðir fyrr enn næsta ár. Evropeiska útgávan verður gjørd klár at framleiða í Sunderland í Onglandi.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Yaris í Fraklandi



Mikudagin 31. januar byrjaði framleiðslan av Toyota Yaris í Valenciennes í Norðurfraklandi. Íløgan í verksmiðjuna er 4,5 mia. krónur, og ætlanin er at 2000 starvsfólk skulu framleiða 150.000 bilar árliga.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Lego bilur til alla familjuna

**Um nøkur ár er ætlanin at foreldur og børn kunna koyra saman í einum Lego bili**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Bilurin "Lego In Motion" verður gjørdur í samstarvi við Johnson Controls, ið er ein av heimsins størstu fyritøkum innan inrættan av bilum*

Bilurin verður ikki bygdur av Lego kubbum, men er ein vanligur bilur sum verður sera barnavinarliga innrættaður.

### Lego víðkar virksemi

Danska leikuverksmiðjan Lego var stovnað í 1932 av timburmanninum Ole Kirk Kristiansen (1891-1958) í Billund. Í 1953 fekk verksmiðjan patent uppá tann heimskenda Lego kubban, sum bleiv ein týðandi útflutningsvøra hjá Danmark. Seinnu árini er virksemið víðkað til annað enn leikur, so sum barnaklæði o.a. Á bilaframsýningini í Detroit var ein Logo konseptbilur sýndur fram.

### Børnini í centrum

Saman við amerikansku fyritøkuni Johnson Controls, sum er ein av heimsins størstu fyritøkum innan innrætting av bilum, hava teir gjørt ein bil, har børnini eru í miðdeplinum. Bilurin kemur at koyra runt í USA og savna inn upplýsingar og vitan um hvussu barnafamiljur vilja hava bilin inrættaðan, áðrenn hann verður settur í framleiðslu. Eitt av endamálunum er, at børnini skulu hava ymiskt at takast við á teimum ofta longu og troyttandi biltúrunum. Har eru til dømis smá borð til at byggja Lego kubbar á, sjónvarpskermur í loftinum, eitt digitalt myndatól, so børnini kunnu taka myndir á túrinum at senda tær beinleiðis til sínar vinir gjøgnum internetið.

### Ongin avgerð

Enn er ongin avgerð tikin um hvør kemur at gera bilin, sigur Eva Lykkegård, ið er samskiftisstjóri hjá Lego í Billund. Tá Lego og samstarvsfelagin í USA eru klárir, verður avtala gjørd við eina bilverksmiðju um framleiðsluna. Í grundini kann bilurin verða gjørdur hvar sum helst, og tað kann líka so væl verða Volvo ella Saab sum ein amerikansk bilverksmiðja, ið kemur at framleiða bilin.

*Kelda: Motor Magasinet*



*Legobilurin verður innrættaður soleiðis at barnafamiljur skulu trívast á teimum ofta longu og troyttandi biltúrunum*

# Nýggjur Peugeot 307 verður í Geneve

**Peugeot hevur almannakunngjørt myndir og aðrar upplýsingar um nýggja Peugeot 307, sum kemur at avloysa tann núverandi Peugeot 306**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

### Góður kvalitetur

Peugeot 307, sum kemur á marknaðin í summar, verður ein av teimum størstu nýggjheitunum á altjóða bilaframsýningini í Geneve, sum verður frá 27. til 28. februar. Talan er um ein heilt nýggjan bil við sportsligum og praktiskum designi í besta Peugeot stýli. Við hesum miðalklassa bilinum hevur Peugeot sett sær sum mál, at brúka tilfar av so góðum kvaliteti, ið bert eru at finna í størri og dýrari bilum.

### Fyrst sum hatchback

Peugeot 307 verður ein tann rúmligast bilurin í sínum klassa. Uttaru mátini verða: longd 4,20 cm, breidd 1,73 cm, og hædd 1,51 cm. At byrja við verða tríggir motorar at velja í, ein 1,6 litur og 110 hk, ein 2,0 litur við 138 hk, og tann nógv umrøddi 2,0 litur HDI turbodiesel við 90 hk, og koyrir 20 km fyri hvønn litur av olju.

Bilurin verður gjørdur sum hatchback við 3 ella 5 hurðum. Seinni koma sedan og stationcar útgávurnar, eins og ein coupé/cabriolet kemur í 2003.

*Kelda: Peugeot Danmark*



*Peugeot 307 er ein heilt nýggjur bilur við sportligum og praktiskum designi í besta Peugeot stýli*

gult cyan magenta svart



ÚT AT KOYRA

# Astra Coupé frá Bertone í Torino



**Tað er næstan ikki endi á hvussu nógvum útgávum Opel Astra verður gjørdur í. Umframt hendan Coupé, sum kom á marknaðin í heyst, er nú eisini ein Cabriolet á veg. Astra Coupé er komin sum avloysari fyri Opel Calibra**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Opel Astra Coupé er ein elegantur sportcoupé frá Bertoni*

### Bertone

Á sama hátt sum tað er siðvenja at nýggjasti klædnamótin kemur frá Paris, koma tey nýggjastu og fínastu bilmodellini frá Torino í Italien. Bertone er ein gomul og kend designarafyritøka, sum hevur teknað nógvar sera snøggar bilar, sum t.d. fleiri modell hjá Alfa Romeo, Ferrari, Lancia, Fiat og ikki at gloyma, góða gamla Mazda 1500 frá miðskeiðis í 60´unum, sum eisini varð teknaður hjá Bertone í Torino. Hesin Astra Coupé er ikki einans teknaður, men er framleiddur hjá "Carrozzeria Bertone" í Torino, sum hava samstarvað við Opel síðan 1987.



### Elegantur bilur

Talan er um ein elegantan sportcoupé við góðum plássi til 4 vaksin fólk. Tyngdarpunktið á Astra Coupé er lægri enn á teimum vanligu Astra modellunum, og fjaðraskipanin, stoytdoyvararnir og stabilisatorstengur saman við 16" felgunum eru gjørd soleiðis, at bilurin hevur sportsligar koyrieginleikar við føstum vegtaki. Allar útgávurnar hava anti-spinn saman við ABS bremsunum.

### Væl ljóðdoyvdur

Astra Coupé er væl ljóðdoyvdur við tað at ramman og motorupphangini eru isolerað frá karossaríinum, og elektroniskt samband er millum speedara og motorin. Tað, at síðurútarnir í hurðunum ikki hava rútarammu, hevur ofta havt við sær, at gummilistarnir slítast og trekkur kemur inn í bilin. Á hesum bilinum er tann trupulleikin loystur við at rúturin glíður eitt petti niður, tá hurðin verður latin upp, og á sama hátt tá hurðin verður latin aftur, fer rúturin uppaftur. Hetta er gjørt fyri at gummilistarnir ikki skulu slítast.

### Heilgalvaniseraður

Bilurin, vit hava fyri okkum, hevur ein heilt nýggjan 4 syl. 2,2 litur motor við 147 hk. Hann fæst eisini við einum 1,8 litur við og 125 hk, eins og ein 2,0 litur turbo við 190 hk kemur í vár. Astra Coupé hevur nógva standard útgerð, so sum el-rútar, el-síðuspegl við hita, forsetur við hæddarstilling og memory, tokulyktir, leðurratt, fartpilot og aircondition. Sum vanligt er á Opel hevur hann heilgalvaniserað karossarí og 12 ára garanti móti gjøgnumtering.

OPEL BERTONE

## Opel Astra Coupé 2,2

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 2,2 litur 147 hk |
| 0-100 km/t | 8,8 sek |
| Bensinnýtsla | 11,9 km/l |
| Dekkstødd | 205/50-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 426,7 cm |
| Breidd | 171,0 cm |
| Hædd | 139,0 cm |
| Eginvekt | 1175 kg |
| Viðførisrúm | 460 litrar |
| Prísur | kr. 260.000,- |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v/Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tlf 316161 |